# Frágreiðing

Altjóða búskapurin

Føroyski búskapurin

Fíggjarlógaruppskotið 2010

Fíggjarmálaráðið

Frágreiðing

Fíggjarlógaruppskotið 2010

September 2009

# INNIHALDSYVIRLIT

1. FORMÆLI LANDSSTÝRISMANSINS....3
2. ALTJÓÐA BÚSKAPURIN ....5
3. FØROYSKI BÚSKAPURIN ....7
3.1 Gongdin í føroyska búskapinum....7
3.2 Niðurstøða og útlit um føroyska búskapin....19
4. FÍGGJARLÓGARUPPSKOTIÐ 2010 ....21
4.1 Raðfestingar á almannaøkinum frá 2004 til 2009 ....23
4.2 Úrslitið á fíggjarlógaruppskotinum 2010 ....25
4.3 Høvuðsraðfestingar og tiltøk ....28

Fíggjarmálaráðið
Postboks 2039
FO-165 Argir
Telefon: 35 20 20
Telefax: 35 20 25
**www.fmr.fo**

# 1. FORMÆLI LANDSSTÝRISMANSINS

Nú er gott ár síðan henda samgongan tók við, og fíggjarlógaruppskotið 2010 er tí fyrsta fíggjarlógaruppskotið, sum henda samgongan hevur fyrireikað. Tilgongdin og fyrireikingarnar til hetta uppskotið hava á mangan hátt verið væl øðrvísi og drúgvari enn árini frammanundan.

Í fyrsta lagi er leisturin í nýggju játtanarlógini royndur í hesum uppskotinum. Í nýggju játtanarlógini skal løgtingið rættiliga tíðliga í árinum samtykkja ein útreiðslukarm, sum landsstýrið síðan skal halda seg innanfyri í fyrireikingunum til fíggjarlógaruppskotið, ið skal verða lagt fyri tingið áðrenn 1. oktober. Leggur fíggjarlógaruppskotið upp til møguligar lógarbroytingar, so skulu hesi lógaruppskot leggjast fyri tingið saman við fíggjarlógaruppskotinum.

Í øðrum lagi rakti altjóða fíggjar- og búskaparkreppan føroyska búskapin næstan samstundis, sum henda samgongan tók við. Hóast altjóða fíggjar- og búskaparkreppan ikki hevur rakt líka meint hjá okkum sum nógva aðrastaðni, so hevur kreppan ført til stórt fall í inntøkum landskassans seinasta árið.

Samgongan og landsstýrið hava tí brúkt nógva orku til at finna loysnir at tillaga almennu útreiðslurnar og búskapin annars til broyttu umstøðurnar, eftir at búskaparligi hákonjunkturin brádliga vendi til búskaparliga afturgongd.

Úrslitið av hesum arbeiði eru tveir bankapakkar og tann sokallaði Ólavsøkupakkin, ið er partur av fíggjarlógaruppskotinum 2010. Ólavsøkupakkin inniheldur út við 20 lógaruppskot, og er pakkin býttur upp í tríggjar partar:

- Virkisskapandi tiltøk
- Bygnaðarlig tiltøk
- Rakstrartiltøk

Við Ólavsøkupakkanum og hesum fíggjarlógaruppskotinum fæst tamarhald á skjótt vaksandi útreiðslunum hjá landskassanum, uttan at hetta virkar tálmandi á búskapin sum heild. Tað hevur stóran týdning at hava atlit at hesum báðum viðurskiftum samstundis, soleiðis at vit ikki standa eftir við einari stórari almennari skuld, tá ið kreppan er av.

***Jóannes Eidesgaard***

# 2. ALTJÓÐA BÚSKAPURIN

Nógvar ábendingar eru um, at stóra fallið í altjóða framleiðsluni og eftirspurninginum, sum byrjaði fyri umleið einum ári síðan, nú er steðgað. Álitið hjá vinnu og brúkarum er styrkt munandi og í nøkrum londum er gongd komin á aftur ídnaðarframleiðsluna, samstundis sum vøru-goymslurnar eru tillagaðar.

Heimshandilin er tí við at fóta sær aftur. Í øðrum ársfjórðingi í ár var vøkstur í bruttotjóðarúrtøkuni í bæði Týsklandi og Fraklandi. Í restini av vesturheiminum er stóra fallið í virkseminum steðgað.

Samanlagt hevur framleiðsluafturgongdin undir búskaparkreppuna verið stór. Í flestu londum er bruttotjóðarúrtøkan minni enn áðrenn kreppuna. Í fyrsta ársfjórðingi í ár var bruttotjóðarúrtøkan í ES-londunum samanlagt 5% minni enn somu tíð í fjør. Tað er serliga í Týsklandi, Stórabretlandi og Svøríki, at bruttotjóðarúrtøkan er nógv fallin undir kreppuni.

Stór óvissa er framvegis um gongdina restina av 2009 og í 2010. Hetta kemst millum annað av, at lagaligi fíggjar- og pengapolitikkurin ikki fer at síggjast aftur fyrr enn síðst í 2009 og í 2010, tá virknaðurin fer at økjast. Søguliga hevur tað eisini víst seg, at tað kemur í minsta lagi eitt ár við stórum vøkstri aftaná ógvusligar niðurgangstíðir í búskapinum.

Mest sannlíkt verður ein lítil framgongd í altjóða búskapinum næsta árið. Grundarlagið fyri hesi metingini er m.a. lítli íløgutørvurin, nú fram-leiðslan er so nógv minkað, nógv viknaðir bústaðarmarknaðir og stórt og

vaksandi arbeiðsloysi. Afturat hesum eru kreditt- og útlánstreytirnar vorðnar nógv strangari.

Hóast vøksturin nú aftur verður positivur, so hevur búskaparkreppan sett djúp spor eftir seg. Altjóða búskapurin stendur tí frammanfyri stórum avbjóðingum sum til dømis stóra og vaksandi arbeiðsloysið.

Komandi árið fer arbeiðsloysið í OECD væntandi at vaksa upp í 10% og í Evrulondunum upp í 12%. Eydnast tað ikki at fremja bygnaðarligar broytingar á arbeiðsmarknaðinum er vandi fyri, at strukturella arbeiðsloysið frameftir fer at verða væl hægri enn tað var áðrenn búskaparkreppuna.

Eisini er vandi fyri, at fleiri lond fara at fáa trupulleikar við at fáa almenna búskapin at hanga saman. Undir kreppuni hevur fíggjarpolitikkurin verið serstakliga ekspansivur við stórum vøkstri í almennu útreiðslunum. Fleiri lond hava fíggjað útreiðsluvøksturin við lántøku, og tí er almenna skuldin nógv vaksin í hesum londum, ið annars eisini hava stórar avbjóðingar á almanna- og pensjónsøkinum. Hetta avmarkar fíggjarpolitiska rásarúmið næstu árini. Framrokningar vísa til dømis, at í USA skulu almennu útreiðslurnar minka 16-17% næstu 7 árini um almenna skuldin skal koma niður á 100% av BTÚ í 2017.

# 3. FØROYSKI BÚSKAPURIN

## 3.1 Gongdin í føroyska búskapinum

Í 2008 vendi hákonjunkturin í føroyska búskapinum til afturgongd. Í fyrru helvt av árinum var afturgongdin avmarkað til fiskivinnuna, sum hevði stórar trupulleikar við skjótt vaksandi oljuprísum, lágum fiskaprísum og vánaligum fiskiskapi. Annars var nógv virksemið í føroyska samfelagnum fram til august 2008, tá føroyski eftirspurningurin brádliga minkaði, samstundis sum altjóða fíggjar- og búskaparkreppan rakti føroyska búskapin.

Búskaparliga afturgongdin kom eftir eina tíð við ógvusligum bráðvøkstri í føroysku privat nýtsluni. Høvuðsorsøkin til bráðvøksturin í nýtsluni vóru nýggju fíggingartilboðini og harðnaða kappingin millum føroysku peningastovnarnar, sum byrjaði í 2005 og rættiliga kom í hæddina í 2006 og 2007.

Stóri nýtsluvøksturin í Føroyum í 2006 og 2007 hongur neyvt saman við útlánsvøkstrinum í føroysku peningastovnunum, sí mynd 2.1, sum vísir innlán og útlán í føroysku peningastovnunum frá mars 2003 til juni 2009.

Vøksturin í inn- og útlánum fylgist væl fram til 2006, tá vøksturin í útlánum brádliga fer langt upp um vøksturin í innlánunum. Stóri útlánsvøksturin steðgaði aftur í seinnu helvt av 2007, men útlánsprosentið hjá føroysku peningastovnunum er nógv hægri nú, enn tað var áðrenn 2006.




Lagaligu fíggingartilboðini og stóri eftirspurningurin á bústaðarmarknaðinum sóust beinanvegin aftur í sethúsaprísunum, sum hækkaðu nógv í 2006 og 2007, serliga í høvuðstaðnum. Sethúsaprísirnir eru síðan minkaðir nakað aftur, sí mynd 2.2.



Tann sokallaða bløðran á bústaðar- og lánimarknaðinum hevur sostatt ikki gjørt eins nógv um seg í Føroyum, sum nógva aðrastaðni, har luft longu kom í bløðruna í 2001. Bløðran brast við einum braki í seinnu hálvu av 2007 og hevði við sær álvarsliga kreppu á fíggjar- og bústaðarmarknaðunum í altjóða búskapinum. Luftin fór eisini úr føroysku bløðruni í 2007, men í Føroyum kom ikki luft í bløðruna fyrr enn í 2006. Tí hava avleiðingarnar á bústaðar- og lánimarknaðinum ikki verið eins ógvusligar í Føroyum, sum í nógvum øðrum londum.

Tað er tí ikki ein føroysk fíggjarkreppa, ið er høvuðsorsøkin til afturgongdina í føroyska búskapinum. Sjálvandi hevur gongdin á føroyska fíggjar- og lánimarknaðinum stóra ávirkan á ávísar vinnur í landinum, t.d. byggivinnuna, har stór sveiggj hava verið í virkseminum seinastu trý árini. Gongdin í føroyska fíggjarheiminum hevur eisini við sær, at eftirspurningurin eftir drúgvum húsarhaldsvørum, t.d. nýggjum bilum, innbúgvi, hvítvørum o.s.fr., er nógv minkaður, tí fólk eru vorðin meira varðin og útseta íløgur í slíkar vørur, soleiðis sum signalini úr fíggjarheiminum hava verið seinasta árið.

Afturgongdin í føroyska búskapinum stavar minst líka nógv frá fallandi eftirspurningi í altjóða búskapinum og kreppu í ávísum pørtum av føroysku tilfeingisvinnuni seinastu árini.

Í 2008 var samlaði lønarvøksturin í Føroyum 1,1%, sí talvu 2.1, men talan var tó um reallønarfall, tí samlaði prísvøksturin var 6,8% í 2008.

**Talva 2.1: Lønargjaldingar býttar á vinnugreinar, 2004-2008**

| *1.000 kr.* | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** |
|---|---|---|---|---|---|
| Landbúnaður | 7.317 | 8.041 | 9.550 | 12.456 | 15.188 |
| Fiskiskapur | 777.161 | 838.373 | 950.511 | 964.663 | 733.942 |
| Ali- og kryvjivirki | 91.615 | 59.959 | 91.518 | 117.561 | 152.614 |
| Ráevnisvinna | 19.465 | 21.756 | 42.471 | 43.409 | 33.309 |
| Fiskavøruídnaður | 396.280 | 380.201 | 362.330 | 349.730 | 314.920 |
| Skipasmiðjur, smiðjur | 124.725 | 130.646 | 144.580 | 162.291 | 161.962 |
| Ídnaður annars | 218.562 | 223.439 | 230.757 | 247.869 | 242.871 |
| Bygging | 380.636 | 377.313 | 437.787 | 495.045 | 531.755 |
| Orkuveiting | 50.341 | 47.151 | 47.829 | 51.589 | 55.687 |
| Handil og umvæling | 596.179 | 585.207 | 627.320 | 687.884 | 715.745 |
| Gistihús og matstovur | 70.081 | 69.726 | 75.658 | 87.052 | 86.834 |
| Sjóflutningur | 222.122 | 228.720 | 225.762 | 270.803 | 273.261 |
| Flutningur annars | 146.080 | 155.452 | 181.905 | 208.894 | 231.217 |
| Postur og fjarskifti | 165.099 | 163.231 | 168.100 | 174.416 | 175.831 |
| Fígging og trygging | 237.714 | 245.807 | 286.236 | 341.030 | 359.381 |
| Vinnuligar tænastur | 192.973 | 207.120 | 235.104 | 268.344 | 297.359 |
| Húshaldstænastur | 40.184 | 42.424 | 46.728 | 52.083 | 59.929 |
| Almenn fyrisiting og tænastur | 2.002.589 | 2.088.485 | 2.140.086 | 2.279.563 | 2.446.563 |
| Felagsskapir og mentan | 118.683 | 128.079 | 133.672 | 141.817 | 145.748 |
| Ótilskilað vinna | 3.535 | 3.692 | 3.658 | 1.662 | 801 |
| **Tilsamans** | **5.861.341** | **6.004.819** | **6.441.558** | **6.958.160** | **7.034.915** |

Fyrstu 8 mánaðirnar í 2009 vóru samlaðu lønargjaldingarnar 4,1% lægri enn somu tíð í 2008, sí talvu 2.2. Í fiskiskapinum minkaðu lønargjaldingarnar 23,9% í 2008 og 25,3% fyrstu 8 mánaðirnar í ár. Í fiskavøruídnaðinum minkaðu lønargjaldingarnar 10% í 2008 og fyrstu 8 mánaðirnar í ár eru lønargjaldingarnar í fiskavøruídnaðinum minkaðar 4,1%. Afturgongdin í virkseminum í fiskavøruídnaðinum er sostatt við at hasa av, meðan tað framvegis er stór afturgongd í lønargjaldingunum í fiskiskapinum.

**Talva 2.2: Lønargjaldingar býttar á vinnugreinar, 2008-2009**

| *1.000 kr.* | **jan.-aug. 2008** | **jan.-aug. 2009** | **Munur í %** |
|---|---|---|---|
| Landbúnaður | 9.746 | 8.160 | -16,3 |
| Fiskiskapur | 481.095 | 359.310 | -25,3 |
| Ali- og kryvjivirki | 92.579 | 108.636 | 17,3 |
| Ráevnisvinna | 22.319 | 21.653 | -3,0 |
| Fiskavøruídnaður | 213.900 | 205.099 | -4,1 |
| Skipasmiðjur, smiðjur | 108.208 | 88.102 | -18,6 |
| Ídnaður annars | 162.285 | 143.688 | -11,5 |
| Bygging | 341.698 | 286.669 | -16,1 |
| Orkuveiting | 36.524 | 39.301 | 7,6 |
| Handil og umvæling | 469.757 | 444.799 | -5,3 |
| Gistihús og matstovur | 58.360 | 49.066 | -15,9 |
| Sjóflutningur | 180.855 | 175.109 | -3,2 |
| Flutningur annars | 145.477 | 133.470 | -8,3 |
| Postur og fjarskifti | 118.751 | 111.759 | -5,9 |
| Fígging og trygging | 243.511 | 234.818 | -3,6 |
| Vinnuligar tænastur | 189.812 | 185.451 | -2,3 |
| Húshaldstænastur | 38.528 | 40.190 | 4,3 |
| Almenn fyrisiting og tænastur | 1.614.322 | 1.699.142 | 5,3 |
| Felagsskapir og mentan | 94.473 | 95.729 | 1,3 |
| Ótilskilað vinna | 396 | 1.303 | 228,8 |
| **Tilsamans** | **4.622.595** | **4.431.453** | **-4,1** |

Fiskiskapurin undir Føroyum hevur verið fallandi seinastu árini. Lítið hevur verið til og er framvegis til av toski, og enn eru lítil útlit fyri, at fiskiskapurin fer at taka seg uppaftur. Nakað hevur verið at fingið av hýsu, men kreppan í altjóða búskapinum hevur havt við sær, at prísirnir eru vánaligir og at marknaðurin fyri nærum øll fiskasløg, undantikið upsa, er fallin í botn. Hetta sæst aftur í bæði avreiðingar- og útflutningstølunum.

Avreiðingarvirðið fyrstu 8 mánaðirnar í ár er munandi lægri enn somu tíð í fjør, meðan avreiðingarnøgdin er á leið tann sama, sí talvu 2.3 og 2.4. Fyri týðandi fiskasløg sum tosk, hýsu og havtasku er nøgdirnar minkaðar, meðan tað er munandi meira avreitt av upsa, svartkalva og gulllaksi.

**Talva 2.3: Avreiðingarnøgd jan.-aug. í tonsum og prosentum**

| *Tons.* | **2008** | **2009** | **Munur** | **Munur í %** |
|---|---|---|---|---|
| **Botnfiskur tilsamans** | **56.414** | **54.945** | **-1.469** | **-3** |
| -Toskur | 7.524 | 5.636 | -1.887 | -25 |
| -Hýsa | 5.516 | 3.299 | -2.217 | -40 |
| -Upsi | 35.085 | 38.695 | 3.611 | 10 |
| -Annar botnfiskur | 8.289 | 7.315 | -975 | -12 |
| **Flatfiskur tilsamans** | **4.228** | **3.987** | **-241** | **-6** |
| -Kalvi | 160 | 140 | -20 | -12 |
| -Havtaska | 1.539 | 1.259 | -279 | -18 |
| -Svartkalvi | 1.668 | 2.026 | 358 | 21 |
| -Annar flatfiskur | 862 | 562 | -300 | -35 |
| Onnur fiskasløg | 16.887 | 18.985 | 2.099 | 12 |
| Skeljadjór | 1.272 | 829 | -443 | -35 |
| Rogn, síl, livur | 238 | 314 | 76 | 32 |
| **Tilsamans** | **79.039** | **79.060** | **22** | **0** |

**Talva 2.4: Avreiðingarvirði jan.-aug. í krónum og prosentum**

| *Mió kr.* | **2008** | **2009** | **Munur** | **Munur í %** |
|---|---|---|---|---|
| **Botnfiskur tilsamans** | **464** | **350** | **-114** | **-24** |
| -Toskur | 155 | 66 | -89 | -57 |
| -Hýsa | 64 | 28 | -35 | -56 |
| -Upsi | 168 | 204 | 35 | 21 |
| -Annar botnfiskur | 77 | 52 | -24 | -32 |
| **Flatfiskur tilsamans** | **89** | **79** | **-9** | **-11** |
| -Kalvi | 6 | 5 | -1 | -16 |
| -Havtaska | 41 | 31 | -10 | -25 |
| -Svartkalvi | 30 | 37 | 7 | 23 |
| -Annar flatfiskur | 11 | 6 | -5 | -44 |
| Onnur fiskasløg | 63 | 71 | 8 | 13 |
| Skeljadjór | 9 | 5 | -4 | -47 |
| Rogn, síl, livur | 3 | 2 | -1 | -45 |
| **Tilsamans** | **628** | **507** | **-120** | **-19** |

Fyrstu 7 mánaðirnar í ár var samlaða virðið á fiskavøruútflutninginum 3% minni enn somu tíð í fjør. Sama tíðarskeið minkaði útflutta nøgdin av fiskavørum við 29%, sí talvu 2.5 og 2.6. Tað eru serliga nøgdirnar av uppisjóvarfiski, toski, hýsu og kongafiski, sum eru minkaðar nógv. Nøgdirnar av alifiski, botnfiski og upsa eru harafturímóti øktar fyrra hálvár í ár.

**Talva 2.5: Útflutningur jan.-jul. í krónum og prosentum**

| *Mió. kr.* | 2008 | 2009 | Munur | Munur í % |
|---|---|---|---|---|
| Botnfiskur | 940 | 742 | -198 | -21 |
| Flundrufiskur | 109 | 85 | -23 | -21 |
| Alifiskur | 507 | 766 | 259 | 51 |
| Uppisjóvarfiskur | 153 | 164 | 11 | 7 |
| Skeljafiskur | 85 | 64 | -22 | -25 |
| Annar fiskur og fiskaúrdráttir | 218 | 137 | -81 | -37 |
| Aðrar vørur | 95 | 126 | 31 | 33 |
| Skip | 351 | 80 | -271 | -77 |
| **Útflutningur tilsamans** | **2.458** | **2.165** | **-293** | **-12** |
| **Fiskavøruútflutningur tilsamans** | **2.013** | **1.959** | **-54** | **-3** |

**Talva 2.6: Útflutningur jan.-jul. í tonsum og prosentum**

| *Tons* | 2008 | 2009 | Munur | Munur í % |
|---|---|---|---|---|
| Botnfiskur | 37.531 | 38.973 | 1.442 | 4 |
| Flundrufiskur | 3.813 | 3.467 | -346 | -9 |
| Alifiskur | 19.323 | 26.832 | 7.509 | 39 |
| Uppisjóvarfiskur | 83.180 | 40.135 | -43.044 | -52 |
| Skeljafiskur | 6.418 | 3.540 | -2.878 | -45 |
| Annar fiskur og fiskaúrdráttir | 46.794 | 26.452 | -20.342 | -43 |
| **Fiskavøruútflutningur tilsamans** | **197.059** | **139.400** | **-57.659** | **-29** |

Størsta avbjóðingin hjá fiskivinnuni eru bygnaðarligir trupulleikar, sum vinnan hevur drigist við í nógv ár. Sæð yvir eitt longri tíðarskeið, hevur fiskiflotin við Føroyar og fiskavirkini samanlagt ongantíð forvunnið pening. Hetta gongur sjálvandi út yvir endurnýgging og menningina av vinnuni.

Stórur vøkstur hevur verið í alivinnuni seinastu árini. Hóast lønargjaldingarnar í alivinnuni ikki fylla so nógv í samlaðu lønargjaldingunum, so er framleiðslu- og útflutningsvirðið stórt. Alifiskurin stóð næstan fyri 40% av útflutningsvirðinum fyrra hálvár í ár, meðan lønargjaldingarnar í alivinnuni bert liggja um góð 2% av samlaðu lønargjaldingunum.

Útlitini fyri alivinnuna eru sum heild góð. Raksturin í alivinnuni er sunnur, bæði fíggjarliga og lívfrøðiliga. Prísútlitini eru hampulig, hóast prísurin er fallin nógv síðani í summar, tá hann var omanfyri 30 kr. fyri kg.

Framleiðslan í føroysku alivinnuni í 2009 verður nakað størri enn í 2008, tá hon var umleið 48.000 tons í livandi vekt.

Miðalprísurin á laksi er í løtuni umleið 24 kr. fyri kg. og framleiðslukostnaðurin er 21 kr. fyri kg. Um henda støðan heldur sær, eru útlitini góð fyri restina av 2009. Fyri 2010 verður mett, at laksaprísurin fer at liggja um 25 kr. fyri kg. fyrra hálvár og 22 kr. fyri kg. seinna hálvár.

Hóast eftirspurningurin og virksemið í føroyska samfelagnum minkaði nógv frá august 2008, so var vøkstur í samlaðu lønargjaldingunum í næstan øllum hinum privatu vinnugreinunum fyri alt árið 2008. Hetta kemst av, at eftirspurningurin og virksemið var sera stórt fram til august 2008.

Tað er ikki fyrr enn í ár, at minkandi virksemið hevur verið at sæð aftur í føroyska búskapinum. Fyrstu 8 mánaðirnar í ár eru lønargjaldingarnar minkaðar í næstan øllum privatu vinnugreinunum, sí talvu 2.2. Tað hevur verið serliga stór minking í lønargjaldingunum í smiðjuvinnuni, byggivinnuni og í gistingarhús- og matstovuvinnuni. Í almenna geiranum hevur vøkstur verið í lønargjaldingunum í bæði 2008 og 2009.

Afturgongdin í handilsvinnuni sæst serliga aftur í minkandi innflutningin-um. Fyrstu 7 mánaðirnar í ár minkaði innflutningurin 740 mió. kr. ella 23%, sí talvu 2.7. Tað skal viðmerkjast, at í fjør var oljuprísurin óvanliga høgur og tað sæst aftur í innflutningstølunum, nú oljuprísurin er nógv minkaður aftur. Hóast innflutningsvirðið á brennievni fyrstu 7 mánaðir-nar í ár er minkað niður í næstan eina helvt, so eru nøgdirnar á leið tær somu.

**Talva 2.7: Innflutningur jan.-jul. í krónum og prosentum**

| *Mió. kr.* | **2008** | **2009** | **Munur** | **Munur í %** |
|---|---|---|---|---|
| Til hav- og landbúnað | 75 | 76 | 1 | 1 |
| Rávøra til fiskavirking | 42 | 57 | 15 | 35 |
| Tilfar til byggivinnu | 341 | 204 | -137 | -40 |
| Tilfar til annan ídnað | 603 | 458 | -146 | -24 |
| Maskinur og amboð | 332 | 215 | -117 | -35 |
| Brennievni | 713 | 392 | -321 | -45 |
| Akfør | 187 | 54 | -133 | -71 |
| Til húsarhaldsnýtslu | 787 | 700 | -87 | -11 |
| Skip og flogfør | 88 | 273 | 185 | 211 |
| **Tilsamans** | **3.169** | **2.428** | **-740** | **-23** |
| **Tilsamans uttan skip og flogfør** | **3.081** | **2.156** | **-925** | **-30** |

Í august í ár vóru 1.137 føroyingar fulltíðararbeiðsleysir, hetta svarar til eitt arbeiðsloysið upp á 4,0%, sí mynd 2.3. Eitt arbeiðsloysið á 4% er ikki høgt samanborið við nógv onnur lond. Tað skal eisini havast í huga, at tað er ikki eitt ár síðan, at føroyska arbeiðsloysið var metlágt. Minsta arbeiðs-loysið, ið verið hevur síðan arbeiðsloysisskipanin fór at virka, var í juni 2008, tá 320 fólk vóru arbeiðsleys, svarandi til eitt arbeiðsloysisprosent á 1,1%. Síðan tá er arbeiðsloysið meira enn trýfaldað og er nú tað størsta síðan mai 2005.




Samstundis sum arbeiðsloysið er vaksið, er talið av løntakarum minkað. Í juni í ár vóru tilsamans 25.222 løntakarar. Hetta eru 817 færri enn í juni í 2008. Minkingin er góð 3%.

Seinastu árini hava alsamt færri løntakarar verið í fiskivinnuni. Í 2002 vóru um 6.000 løntakarar í fiskivinnuni, nú eru um 4.300. Serliga seinasta árið hevur afturgongdin í løntakaratalinum í fiskivinnuni verið stór, onkrar mánaðir yvir 10%. Í juni í ár var minkingin 5% samanborið við juni í fjør. Hetta kann vera ein ábending um, at nú fer ikki at minka stórt meira við løntakarum í fiskivinnuni.

Tann 1. august í ár fór fólkatalið í Føroyum á fyrsta sinni upp um 49.000, tá búðu 49.006 fólk í Føroyum. Vanliga hava fleiri fólk flutt av landinum enn til landið, tá arbeiðsloysið hevur verið vaksandi. Soleiðis er ikki hesaferð, tað flyta framvegis fleiri fólk til landið. Orsøkin til at tað ikki er soleiðis hesaferð er uttan iva altjóða búskaparkreppan, sum hevur rakt nógv harðari aðrastaðni við stórum og skjótt vaksandi arbeiðsloysið.

Sostatt er torførari at fáa arbeiði í øðrum londum enn í Føroyum. Tað er tí sannlíkt, at fólkatalið í Føroyum eisini fer at halda sær omanfyri 49.000 um árskiftið.

Ein avleiðing av búskaparkreppuni og minkandi eftirspurninginum er eitt fall í brúkaraprístalinum, sí talvu 2.8. Í 2. ársfjórðingi í ár var brúkaraprístalið 1 prosentstig lægri enn sama ársfjórðing í 2008. Tað eru serliga fallandi olju- og rávøruprísir, sum trýsta brúkaraprístalið niður eftir. Minkandi prísvøkstur stimbrar privata eftirspurningin og nýtsluna av vørum og tænastum.

**Talva 2.8: Brúkaraprístalið skift á 12 høvuðsbólkar, 2. ársfj. 2002-2009**

| *2. ársfjórðing* | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Brúkaraprístalið** | **100,5** | **102,0** | **102,2** | **103,9** | **106,2** | **109,1** | **116,4** | **115,4** |
| Matur og drekka | 103,4 | 103,5 | 104 | 104,8 | 107,7 | 111,7 | 119,4 | 121,6 |
| Rúsdrekka og tubbak | 100,2 | 101 | 101,6 | 110,4 | 114,3 | 115,7 | 118,5 | 127,7 |
| Klædnavørur og fótbúnaður | 101,4 | 99,9 | 98,0 | 92,5 | 93,6 | 92,8 | 97,1 | 98,1 |
| Býli | 93,8 | 95,1 | 93,9 | 98,0 | 101,8 | 111,5 | 130,9 | 118,5 |
| Húsbúnaður, húsarhaldstól o.l. | 102,3 | 102,4 | 102,2 | 101,2 | 99,6 | 99,4 | 95,3 | 96,8 |
| Heilsa | 102,4 | 108,4 | 112 | 112,9 | 112,9 | 113,5 | 115,7 | 116,0 |
| Flutningur | 99,9 | 105,4 | 107,6 | 110,8 | 116,0 | 116,1 | 119,9 | 114,5 |
| Samskifti | 92,8 | 91,0 | 87,1 | 87,6 | 89,0 | 88,5 | 88,4 | 88,2 |
| Frítíð og mentan | 105,7 | 107,9 | 107,5 | 107,1 | 105,3 | 104,2 | 108,8 | 107,5 |
| Útbúgving | 104,1 | 100,3 | 94,8 | 101,2 | 101,2 | 112,8 | 112,8 | 117,3 |
| Hotel og matveitarar | 106,4 | 108,1 | 111,5 | 113,0 | 115,2 | 118,9 | 126,6 | 132,0 |
| Ymiskar vørur og tænastur | 103,7 | 105,5 | 107,2 | 108,7 | 111,0 | 112,8 | 116,3 | 126,5 |

Í 2008 var hallið á føroyska handilsjavnanum 687 mió. kr. Virðið á innflutninginum var 5 mia. kr. og útflutningsvirðið var 4,3 mia. kr. Handilsjavnahallið var 93 mió. kr., skip undantikin, fyrra hálvár í ár. Vend er tí komin í skjótt vaksandi handilsjavnahallið seinastu árini, sí talvu 2.9.

**Talva 2.9: Føroyski handilsjavnin, 2006-2008**

| *Mió. kr.* | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|
| Útflutningur | 3.869 | 4.057 | 4.323 |
| Útflutningur uttan skip | 3.793 | 3.963 | 3.718 |
| Innflutningur | 4.692 | 5.522 | 5.013 |
| Innflutningur uttan skip | 4.559 | 5.032 | 4.922 |
| **Handilsjavni** | **-823** | **-1.466** | **-687** |
| **Handilsjavni uttan skip** | **-766** | **-1.069** | **-1.204** |

Heldur henda gongdin sær, so verður allarhelst avlop á føroyska gjaldsjavnanum í ár og í 2010. Gjaldsjavnin vísir á virðið á øllum flytingum millum Føroyar og útheimin eitt ávíst tíðspunkt. Føroyski gjaldsjavnin er enn ikki gjørdur upp fyri 2007 og 2008, men við ársenda 2006 var føroyska nettoáognin uttanlands 3,7 mia. kr. Talva 2.10 vísir eina útgreining av nettoogn landskassans frá 2006 til 2008.

**Talva 2.10: Nettoogn landskassans 2006-2008.**

| *Ultimo (mió. kr.)* | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|
| **Nettoogn** | **643** | **1.385** | **1.156** |
| **Bruttoogn** | **3.959** | **4.753** | **4.484** |
| -Gjaldførið í landsbankanum | 1.093 | 2.467 | 2.318 |
| -Annað í umferð | 818 | 949 | 949 |
| -Útbúnaður | 2.048 | 1.337 | 1.217 |
| **Bruttoskuld** | **3.316** | **3.368** | **3.327** |
| -Skuld til danska statin | 500 | 500 | 500 |
| -Brævalán | 2.225 | 2.149 | 2.109 |
| -Onnur skuld | 592 | 719 | 719 |

Fíggjarstøðan hjá landskassanum er góð. Við árslok 2008 var nettoognin hjá landskassanum 1 mia. og 156 mió. kr. Bruttoskuldin var 3,3 mia. kr., svarandi til umleið 25% av BTÚ.

Mynd 2.4 vísir gongdina í gjaldføri landskassans frá september 2003 til februar í ár.




## 3.2 Niðurstøða og útlit um føroyska búskapin

Við einum arbeiðsloysisprosenti heilt niðri á 1,1% kann ikki staðfestast annað enn, at føroyski búskapurin var yvirupphitaður og um at kóka yvir, tá búskaparliga gongdin vendi. Manglandi arbeiðsmegi var ein stórur trupulleiki, og legði hetta stórt trýst á prís- og lønarlagið, samstundis sum handilsjavnahallið var skjótt vaksandi. Búskaparliga vendin var ikki neilig í so máta.

Síðan juni 2008 er føroyska arbeiðsloysið støðugt vaksið og var í juli í ár komið upp á 4%. Føroyska abeiðsloysið er sostatt framvegis lágt í altjóða høpi. Við hesi fortreyt er størsta fíggjarpolitiska avbjóðingin í Føroyum ikki at reka ein ekspansivan og virksemisskapandi fíggjarpolitikk. Størsta fíggjarpolitiska avbjóðingin verður harafturímóti at fáa tamarhald á skjótt

vaksandi hallinum á fíggjarlógini, uttan at hetta fær tálmandi avleiðingar fyri føroyska búskapin sum heild.

# 4. FÍGGJARLÓGARUPPSKOTIÐ 2010

Fyrireikingarnar og tilgongdin til fíggjarlógaruppskotið 2010 hava verið nakað øðrvísi enn árini frammanundan, tí nýggja játtanarlógin, sum Løgtingið hevur samtykt, og sum í fullum líki kemur í gildi frá ársbyrjan 2010 hevur í ávísan mun havt ávirkan á tilgongdina við hesum fíggjarlógaruppskotinum. Við Ólavsøkupakkanum hevur Løgtingið tikið støðu til, hvørjir karmar skulu galda fyri komandi fíggjarlógaruppskot, bæði tá tað snýr seg um rakstur og um íløgur. Uppskotið, sum landsstýrið nú leggur fyri tingið, livir upp til hesa samtykt fult og heilt. Ein onnur avleiðing av játtanarlógini er eisini, at saman við uppskotinum til fíggjarlóg fyri komandi ár, verður ein røð av lógarupskotum løgd fram, sum eru beinleiðis ein fortreyt fyri, at sjálvt uppskotið kann halda.

Ólavsøkupakkin, sum hevur verið í einari tilgongd í rættiliga rúma tíð, er ein roynd at fáa broytt nakrar bygnaðarligar skeivleikar á fíggjarlógini, ein roynd at skapa virksemi runt um í landinum og ein roynd at tálma stóru útreiðsluøkingunum, sum verið hava mongu seinastu árini. Hesin pakki hevur so aftur verið ein fortreyt fyri teir fíggjarligar karmar, sum Løgtingið hevur ásett.

Í ávísum førum hava verið gjørdar tillagingar í Ólavsøkupakkanum. Samtyktin frá Løgtinginum sigur, at um ávíst tiltak ikki fær politiska undirtøku, so skal landsstýrið koma við øðrum uppskotum, sum hava sama virkna.

Tað eru tó fýra stór uppskot, sum ikki enn eru klár at leggja fram. Tað eru uppskotini viðvíkjandi pensjónsnýskipan, inntøkutrygd, sjúkrakassareformur og bygnaðarbroytingar innan Apoteksverkið. Hesi verða eftir ætlan løgd fram í novembur, men eru tó innroknaði í karmarnar.

Ein onnur avleiðing av Ólavsøkupakkanum er, at íløgukarmurin fyri 2010 er hækkaður við 90 mió. kr í mun til í ár. Hetta stig er lutvíst tikið til tess at leggja upp fyri tí minking, sum kommunurnar hava gjørt í teirra íløgukarmum .

Landsstýrið vónar, at vit við hesum uppskoti hava verið skynsom og ábyrgdarfull. Stóra avbjóðingin um ikki at økja útreiðslurnar ótálmað, er rokkið, tí útreiðsluøkingin í sjálvum rakstrinum liggur um 0,3%, og tá eru góð 3% í lønarvøkstri tikin við. Onnur avbjóðingin um at halda virksemið uppi runt landið er vónandi eisini rokkið. Við hesum uppskoti verður m.a. mælt til, at vit aftur fara at byggja skip í Føroyum til tað almenna, nevniliga eitt nýtt havrannsóknarskip.

Harðar atfinningarnar hava verið um, at vælferðin er løgd undir trýst. Landsstýrið hevur við hesum uppskoti veruliga lagt seg eftir at varðveita grundleggjandi vælferðartænasturnar. Men givið er, at tá tað júst er innan hesi øki, at útreiðsluøkingarnar hava verið størstar, so kann ein minking í vøkstrinum kennast sum afturgongd, hóast talan ikki nýtist at vera um beinleiðis sparingar.

## 4.1 Raðfestingar á almannaøkinum frá 2004 til 2009

*Játtanin til almannaøkið*

Játtanin til almannaøkið er hækkað úr 1,3 mia. kr. í 2004 upp í góðar 1,6 mia. kr. í 2009. Herumframt er útgjaldið úr Samhaldsfasta til pensjónistar fleirfaldað seinastu árini.

*Pensjónin tilsamans*

Íroknað Samhaldsfasta er árliga pensjónin til stakan pensjónist hækkað umleið 30.000 kr. frá 2004 til 2009. Til pensjónistahjún er pensjónin hækkað umleið 55.000 kr. sama tíðarskeið.

*Fyritíðarpensjón*

Í 2007 varð gjørd lógarbroyting, soleiðis at fyritíðarpensjónistar við lægstu fyritíðarpensjón, umframt javningina, eisini fáa eina nýggja viðbót. Henda viðbót varð innførd í tveimum, fyrru ferð 1. januar 2008 og seinnu ferð 1. januar 2009. Samlaða hækkingin er 2.637 kr. um mánaðin. Eisini varð aldursmarkið hækkað, soleiðis at fyritíðarpensjónistar nú kunnu fáa hægri fyritíðarpensjón líka til teir eru 67 ár. Frammanundan var markið 60 ár.

Frá 1. januar 2008 var mótrokningin í fyritíðarpensjónini av aðrari inntøku minkað úr 60% niður í 30%, soleiðis at tað loysir seg betur at brúka sín restarbeiðsførleika til lønandi arbeiði.

*Viðbót til ávísar pensjónistar*

Viðbótin til ávísar pensjónistar var 1. januar 2008 hækkað 1.140 kr. mánaðarliga.

*Samhaldsfasti*

Veitingin úr Samhaldsfasta er hækkað fleirfaldað frá 2004 til 2009, úr 697 kr. um mánaðin 1. januar 2004 upp í 2.500 kr. um mánaðin 1. januar 2009.

*Barnagjald til stakar uppihaldarar*

Stakir uppihaldarar fáa nú 6.000 kr. eyka í árligum barnagjaldi fyri hvørt barnið.

*Eldrabústaðir*

Talið av eldrabústaðum er økt munandi kring alt landið. Frá 2004 til 2006 vórðu 133 nýggj pláss tikin í nýtslu. Síðan 2007 eru onnur 33 tikin í nýtslu. Tilsamans 166 nýggj pláss frá 2004 til 2009.

*Eldrarøktin*

Við øktari raðfesting og játtan er talið av starvsfólkum innan eldraøkið økt nógv síðan 2003. Talið av starvsfólkum í eldrarøktini er økt við umleið 200 fólkum síðan 2003. Játtanin til eldraøkið er eisini økt munandi seinastu árini. Í 2003 var játtanin 228 mió. kr. og á fíggjarlógini 2009 er játtanin 320 mió. kr.

*Sambýli til sinnsiveik*

Síðan 2004 eru hesi sambýli til sinnisveik tikin í nýtslu: Undir Fobbakletti í Sandavági (2004). Á Traðarvegi í Sandavági (2005). Við Heyggjar í Havn (2007). Eisini er ein sosialpsykiatri við bústaðar- og virknistilboðum sett í verk.

*Onnur tiltøk á almannaøkinum*

Nýggj stuðulsfólkaskipan sett á stovn 2006. Stuðul til endurbúgving ikki tengt at inntøku og ogn hjá hjúnafelaga. Ættleiðingarstuðulin er øktur úr 50.000 kr. upp í 75.000 kr. fyri hvørja ættleiðing.

## 4.2 Úrslitið á fíggjarlógaruppskotinum 2010

Í hesum fíggjarlógaruppskotinum er RLÚ-úrslitið -767,7 mió. kr., sí mynd 2.5.

Inntøkurnar í fíggjarlógaruppskotinum 2010 eru mettar til 3 mia. 917 mió. kr. Herav er skattur 1 mia. 688 mió. kr. Avgjøld, tollur o.a. eru 1 mia. 594 mió. kr. Heildarveitingin o.a. úr danska ríkiskassanum verður sambært ásetingini í samgonguskjalinum, har seinasta fimm ára skeiðið skal liggja til grund, óbroytt 635 mió. kr.

Rakstrar-, løgu- og útlánsútreiðslurnar (netto) verða mettar til 4 mia. 685 mió. kr. Herav eru rakstrarútreiðslurnar 4 mia. 326 mió. kr., løgu-útreiðslurnar 317 mió. kr., og rentuútreiðslurnar 42 mió. kr.




Talva 2.11 og 2.12 vísa gongdina í inntøkum og útreiðslum landskassans frá 2004 til 2010.

**Talva 2.11: Inntøkur landskassans, 2004-2010**

| *Mió. kr.* | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** | **2010** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skattainntøkur | 1.539 | 1.508 | 1.681 | 1.791 | 1.829 | 1.696 | 1.688 |
| Avgjaldsinntøkur | 1.259 | 1.322 | 1.547 | 1.722 | 1.629 | 1.539 | 1.569 |
| Ymsar inntøkur | 41 | 67 | 120 | 45 | 44 | 25 | 25 |
| Heildarveiting o.t. | 633 | 631 | 632 | 632 | 635 | 635 | 635 |
| **Tilsamans** | **3.472** | **3.528** | **3.980** | **4.190** | **4.137** | **3.895** | **3.917** |

Viðm: Tølini fyri 2009 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2010 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

**Talva 2.12: Útreiðslur landskassans, 2004-2010**

| *Mió. kr. (netto)* | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** | **2010** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 3.324 | 3.467 | 3.578 | 3.767 | 4.251 | 4.404 | 4.326 |
| Løguútreiðslur | 228 | 201 | 268 | 292 | 232 | 227 | 317 |
| Rentuútreiðslur | 72 | 71 | -7 | -14 | -16 | 4 | 42 |
| **Tilsamans** | **3.624** | **3.739** | **3.839** | **4.045** | **4.467** | **4.635** | **4.685** |

Viðm: Tølini fyri 2009 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2010 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

Ein útgreining av løgunum í 2010 er víst í talvu 2.13.

**Talva 2.13: Løguætlanin fyri 2010** (1.000 kr.)

| | | |
|---|---|---|
| § 2 | **Løgmansfyrisitingin o.a.** | **9.000** |
| | Umbygging í Tinganesi | 9.000 |
| § 5 | **Fiskivinna** | **31.500** |
| | Tilbúgvingarsamskipanin | 2.000 |
| | Útgerð til Magnus Heinason | 1.500 |
| | Nýtt havrannsóknarskip | 20.000 |
| | Trygdarmiðstøðin | 8.000 |
| § 6 | **Vinnumál** | **4.700** |
| | Strandfaraskip Landsins | 4.700 |
| § 7 | **Útbúgving og gransking** | **57.200** |
| | Eftirskúlar | 1.000 |
| | Skúladepil í Marknagili | 28.000 |
| | Studentaskúlin í Hoydølum | 3.700 |
| | Maritimur depil | 1.000 |
| | Tjóðleikahús | 1.500 |
| | Bókasøvn | 500 |
| | Kirkjubømúrurin | 1.500 |
| | Ítróttarhøll á Sandoynni | 10.000 |
| | Ítróttar- og mentanarverkløg | 10.000 |
| § 11 | **Heilsumál** | **57.000** |
| | Medicoteknisk tól | 17.000 |
| | Landssjúkrahúsið | 34.000 |
| | Klaksvíkar Sjúkrahús | 3.000 |
| | Suðuroyar Sjúkrahús | 3.000 |
| § 12 | **Almannamál** | **75.000** |
| | Alv-skúlin | 2.000 |
| | Bústovnar | 31.000 |
| | Eldrasambýli | 42.000 |
| § 15 | **Innlendismál** | **82.600** |
| | Umvæling av almennum bygningum | 22.000 |
| | Umhvørvisstovan | 2.000 |
| | Orkuverkætlanir | 3.000 |
| | Øravík-Hov | 2.700 |
| | Dagføring av brúm og tunnlum | 4.500 |
| | Skálabotnur-Strendur | 2.400 |
| | Vegurin omanfyri Skálafjørð | 8.000 |
| | Innkoyringarvegur til Tórshavn | 5.000 |
| | Trygdartiltøk, størri ábøtur og til at taka | 6.000 |
| | Vegagerð í Leirvík | 5.000 |
| | Rituvíkarvegurin | 3.500 |
| | Vegagerð í Kalsoy, vegir og tunnlar | 2.500 |
| | Famjin-Øravík | 2.000 |
| | Brúgvin um Streymin | 7.000 |
| | Skálafjarðartunnilin, ráðgeving | 1.100 |
| | Havnin í Skúvoy | 2.000 |
| | Smáábøtur á havnir | 1.000 |
| | Tyrlupallur á Kirkju | 3.000 |
| | **Løgur tilsamans** | **317.000** |

## 4.3 Høvuðsraðfestingar og tiltøk

Endamálið við Ólavsøkupakkanum er at fremja virkisskapandi tiltøk og at gera neyðugar rakstrar- og bygnaðarligar broytingar á fíggjarlógini. Niðanfyri eru nevnd nøkur av teimum stóru átøkunum.

Virkisskapandi tiltøk:

- Nýggj lóg um Húsalánsgrunnin
- Leysgeving av kapitali til uppsparing til sethúsabygging
- Marknaðarføring av Føroyum sum ferðavinnu- og íløguland
- Útbygging av Landssjúkrahúsinum
- Røktarheim í Vági
- Ítróttarhøll á Sandoynni
- Flogvøllurin í Vágum
- Nýtt havrannsóknarskip
- Hækking av íløgukarminum

Bygnaðarlig tiltøk:

- Lækking av rentustuðulinum
- Avtøka av mvg-stuðulinum til sethúsabygging
- Víddargjald fyri alivinnuna
- Inntøkutrygdin
- Tollfrítøkan fyri tubbak niður í helvt
- Nýggj pensjónsskipan
- Hækking av lønhæddargjaldinum fyri peningastovnar
- Kapitalvinningsskatturin fylgja rentustuðulinum

Samanlagt eru øll hesi tiltøkini stimbrandi fyri føroyska búskapin. Í 2010 er samlaði pakkin stimbrandi við umleið 1,3% av BTÚ og í 2011 við umleið 2% av BTÚ.